# Komið so í gongd, flokkar!

Á tíðindafundi í løgtingshúsinum 20. september avdúkaði forvinnan í Demokratiu, Eyðgunn Samuelsen, eina umfatandi kampagnu, sum er ætlað at fokusera upp á og skapa kjak um, hví Føroyar eru so aftarliga viðv. kvinnuumboðan í politikki – og hvat vit kunnu gera fyri at bøta um hetta.

Tað løgna er, at vælvildini bilar eftir øllum at døma einki. Allir flokkar siga seg taka undir við javnstøðu í politikki, og næstan 90% av fólkinum av báðum kynum sigur tað sama. Hetta framgongur av fundum, sum Demokratia hevði við allar flokkarnar í vár, og av eini Gallupkanning frá januar-februar.

Øll vilja altso politiska javnstøðu, men kortini líkjast vit í so máta burtur úr í norðurlendsku familjuni. Vit sleikja botnin við bara 9% kvinnum í løgtinginum og 0% í landsstýrinum, og í kommunustýrisumboðan liggja vit næstniðast. Útbúgvingarstøðinum og royndunum hjá føroyskum kvinnum bagir heldur einki, tvørturímóti. Tað eru longu fleiri ártíggjur, síðan føroysku kvinnurnar av álvara fóru út á arbeiðsmarknaðin, og líka síðan er útbúgvingarstøðið hjá kvinnunum støðugt hækkað. Og rákið sær út til at ætla sær at halda fram – hygg bara at miðnámsskúlunum, sum eru fullir av gentum.

Hvussu ber tað so til, at tá vit bæði hava fortreytirnar og viljan til politiska javnstøðu – um ikki annað nøkulunda – at vit eru so ekstremt aftarliga? Demokratia hevur ikki Tað Endaliga Svarið. Men byrjanin til loysnina er at seta spurningar.

Ein spurningur er, hvørt tað er rættari at brúka sítt fulla potentiali ella bara uml. helvtina. Svarið er sjálvandi tað fyrra, fyrr var illa. Men tað føroyska samfelagið brúkar (næstan) bara mannligu helvtina har, sum avgerðir, sum raka stórar partar av samfelagnum, verða tiknar, t.d. í politikki og í vinnulívinum. Tað vil siga, at tann vitan og tær royndir, sum búgva í kvinnuligu helvtini, ikki koma samfelagnum – tvs. okkum øllum – til góðar í nóg stóran mun. Er hetta rætt?

Ein annar er orsøkvirkningur spurningurin. Ofta er at hoyra, at kvinnurnar mugu sjálvar um, um tær tíma og vilja fáast við politikk ella ikki. Um tær ikki tíma og vilja, skulu tær ikki noyðast. Punktum – hvør skal siga, friður veri við tí, og so tosa vit ikki meira um tað. Men er tað nú eitt serliga sunt samfelagstekin, at fáir borgarar hava áhuga í politikki? Er eyðkennið fyri eitt vælvirkandi demokrati ikki nettupp nógvir engageraðir og aktivir borgarar úr øllum samfelagsbólkum? Tá so fáir borgarar úr kvinnuligu helvtini stilla upp, og enn færri verða valdar hóast frálíku fortreytirnar og breiðu vælvildina, er so ikki okkurt galið onkrastaðni? Hvørjum er tað galið við - kvinnunum sjálvum, veljarunum, valskipanini, flokkunum og/ella onkrum meiri yvirskipaðum og fløktum mekanismum?

Ein triði er gapið millum teori og praksis. Sum nevnt er ein stórur meiriluti fyri politiskari javnstøðu, bæði í flokkunum og millum fólkið. Men eingin flokkur hevur nakra samlaða javnstøðuætlan. Tað er annars universelt galdandi, at tá man hevur eitt problem – stórt ella lítið - so byrjar man við at definera og formulera tað. 2. stig er at finna uppskot til loysnir, og 3. stig er at handla, at føra loysnirnar út í lívið. Virka tær ikki, finnur man upp á okkurt nýtt. Inntil problemið er loyst. Hesa prosess eru vit vitni til hvønn dag, eisini í politiska lívinum. Tunnlar, roykiforboð, skattalætti, bygging av røktarheimum osfr. – einki kemur av sær sjálvum; alt er úrslit av, at onkur fyrst hevur hugsað ein tanka, sett sær hann sum mál og ført tað út í lívið.

Fráverandi javnstøðan í politikki verður ikki definerað sum eitt problem av sitandi myndugleikum. Tá teir verða spurdir, svara teir jú, men er tað bara fyri at vera politskt korrektir? Var tað eisini politisk korrektheit, sum fekk løgtingið at skriva undir CEDAW-sáttmálan í 1987 og at seta eina nevnd fyri øktum kvinnuleikluti í politikki (Demokratia) í 2006? Hvat er annars gjørt við spurningin millum 1987 og 2006? Er ætlanin at parkera spurningin hjá Demokratiu í formi av einum áliti, sum verður sett í eina reol at savna støv? Tí eingin við einum sindri av skili fyri pengum kann í álvara meina, at Demokratia kann flyta fjøll fyri nakrar heilt fáar hundraðtúsund kr. um árið í 1½ ár? Útnorðurráðið mælti í 1999 til í minsta lagi 500.000 kr. í 5 ár, skuldi nevndin gera nakran mun. Tá tað í so gyltum fíggjarligum tíðum sum nú ikki verður mett at vera ráð til meira, nær verður tað so? Og hvat er meinigin so? At pynta upp á CEDAW-próvtøkuavrikið í 2008? Men Demokratia kann ikki vera eitt endamál í sær sjálvari, ha?

Spurningarnir eru nógvir, men Demokratia kann ikki loysa teir allar einsamøll, og so yvirhøvur ikki við síni ússaligu játtan og stokkutu lívsløtu. Nevndin kann vera við til at varpa ljós á spurningar, definera og formulera teir og kasta teir út – men í hinum endanum má onkur hjálpa til við at lofta teimum, varðveita lívið í teimum, finna loysnir og føra tær út í lívið.

Her kemur Gallup-kanningin inn við einum interessantum svari. Heili 74% taka undir við, at politisku flokkarnir skuldu hildið átøk fyri at vaksa um áhugan hjá kvinnum í at luttaka í politikki. Og teir siga seg jú eisini ganga inn fyri javnstøðu. Íðan, so er bara um at koma í gongd, ikki sannheit? At seta sær hetta sum mál, akkurát sum so nógv annað. Tá tað ber til at fáa fólk at renna fyri lívinum og vera fyri ella ímóti einum tunnli ella valdømi, ber eisini til at fáa tey við upp á at praktisera politiska javnstøðu, serliga tá tey í teoriini longu frammanundan taka undir við tí. 26% av kvinnunum og 12% av monnunum valdu sambært Gallup-kanningini eina kvinnu til løgtingsvalið 2004. Her er jú ikki heilt samsvar millum orð og gerðir. Men tað ber sum sagt til at gera nakað við. Ikki at tað er lætt – men tað er nú heldur ikki heilt ómøguligt.

Demokratia mælir tí flokkunum til:

- at orða eina javnstøðuætlan fyri flokkin, at seta ítøkilig máltarbeiða meira miðvíst við javnstøðu innanfloks og í sambandi við uppstilling o.ø.
- at arbeiða støðugt og alla tíðina við at økja áhugan hjá kvinnum fyri politikki
- at greiða veljarunum frá, hvat teir vilja (valskrá) virka fyri í sambandi við javnstøðu í samfelagnum sum heild

**Demokratia**

# Hvørjir eru neyðugu førleikanir hjá einum biskuppi?

**BERGUR JACOBSEN**



Biskuppurin hevur ein sera týdningarmiklan leiklut í lívinum hjá fólkakirkjuni. Tí er tað ikki líkamikið, hvørji førleikakrøvini eru, og á hvørjum grundarlgi hann verður valdur.

Øll biskupsvalevnini eru doypt, prestlærd og prestvígd, og tí taki eg tað fyri givið, at tey øll eru kristin menniskju, ið kunnu røkja biskupsstarvið. Men, samstundis so fari eg at loyva mær at nema við nøkur viðurskifti, ið avgjørt eiga at vera grundarlag undir teimum førleikum, prestar og kirkjuráðslimir skulu velja biskupp eftir. Teirra trúarviðurskifti verða ein spurningur millum tey og Várharra.

1. Føroyska fólkakirkjan er ikki longur ein provins, ein avkrókur í donsku fólkakirkjuni, men føroyskja kirkjan er nú ein kirkja millum kirkjurnar í Norðurlondum og Norðurevropa. Tí noyðist føroyska fólka at hava ein leiðara, sum hevur ein profil uttan fyri føroyska dunnuhylin. Ein biskupp, ið er kendur og virdur í londunum kring okkum, og sum kann umboða føroyska kirkjuna virðiliga.

2. Biskuppurin er ovasti lærumynduleikin í kirkjuni, og tí er tað sera umráðandi, at biskuppurin eisini hevur hægsta lærdóm innan guðfrøði, og er vanur at arbeiða fakliga við læruspurningum. Guðfrøðideildirnar eru ikki lærumyndugleiki, tær kunnu útvega okkum tólini at taka avgerðir við, men at enda so er tað biskuppurin (aðrastaðnis er tað bispakollegiið, ið er ovasti lærumunduleiki, men í Føroyum er bara ein biskuppur!).

3. Sum ovastur í kirkjuni er eisini neyðugt at biskuppurin hevur nágreiniligan kunnskap til kirkjuliga løggávu, soleiðis at viðkomandi kann taka støðu í umsitingarspurningum á jøvnum føti við løgfrøðingar og onnur.

4. Í eini kirkju millum millum kirkjurnar, er tað somuleiðis umráðandi, at biskuppurin hevur hollan málkunnleika, ikki bara til tey bíbilsku málini, men eisini til tey mál, ið verða tosað í londunum kring okkum, fyri á tann hátt at kunna geva føroysku kirkjuni gagn av tí ið rørist í guðfrøðini í londunum kring okkum, og fyri at kunna møta hinum kirkjunum á ein virðuligan hátt.

5. Sum starvsfolkaleiðari (hóast hendan uppgávan eisini hoyrir undir próstin), eigur ein biskuppur somuleiðis at hava nágreiniligan kunnskap til starvsfólkaviðurskiftir, starvsfólkaleiðslu og fakfelagsviðurskifti. (Av røttum átti tað at verið eitt krav, at biskuppar og próstar vóru sendir á kirkjuliga leiðaraskeiðið hjá Handilsháskúlanum í Keypmannahavn!).

6. Fólkatekki einans er ikki nóg góður førleiki til biskuppsstarvið. At vilja tekkjast øllum, er ikki tað sama sum at tekkjast Várharra. Sum leiðari noyðist biskuppurin av og á, at taka avgerðir, ið ikki hóva øllum. Biskuppurin eigur fyrst og fremst at tæna evangeliinum, og tað er ikki tað sama, sum at vera vinur við øll, ella at smílast til høgru og vonstru.

So er tað sjálvandi spurningurin, hvør av valevnunum, ið lúka ovanfyri nevndu førleikakrøv. Øll valevnini eru valbar, sambært galdandi lógum, og tað verður ongin vanlukka um ein og hvør av teimum verður biskuppur. Men, ein veljarakanning á heimasíðuni hjá Norðlýsinum fekk meg til at huksa um hvussu støða verður tikin til biskupsvalið, og tí loyvi eg mær til at geva eitt persónligt boð uppá eitt biskuppsvalevni.

Her eru eini ómsæðin boð uppá hvørt valevni ið er best egna sambært omanfyri nevndu førleikakrøvum.

1. Hvør av virkandi føroysku prestunum er kendur uttan fyri Føroyar fyri sítt vísundaliga virksemi? Hvør av virkandi føroysku prestnum verður virdur fyri sama vísundaliga virksemi á guðfrøðidelidunum í londunum kring okkum? Svarið er Jákup Reinert Hansen Phd. (Philosofical Doctor).

2. Hvør av virkandi prestunum í føroyskju fólkakirkjuni hevur hægsta fakliga lærdóm, og tískil førleika til at taka avgerðir í læruspurningum á jøøvnum føti við guðfrøðideildirnar á lærdu háskúlunum? Svarið er Jákup Reinert Hansen,. PhD.

3. Hvør av virkandi føroysku prestunum hevur verið við til at smíða kirkjuliga lógarverkið, sum er grundarlagið undir yvirtøkuni av føroysku fólkakirkjuni? Og sum tí er førur fyri at taka avgerðir um og ráðgeva um hesi viðurskifti? Svarið er Jákup Reinert Hansen PhD., sum næstan búði í menntamálaráðnum meðan kirkjulógávan varð smíðað.

4. Hvør av virkjandi føroysku prestunum hevur kunnleika til flest evropeisk mál, og sum tí hevur møguleika fyri at kunna seg um, hvat ið gongur fyri seg á guðfrøðiøkinum í londunum kring okkum, og sum kann samskifta við kirkjurnar kring okkum á teirra egna máli? Svarið er Jákup Reinert Hansen PhD.

5. Ein biskuppur skal sjálvandi, sum ovasti starvsfólkaleiðari vera kønur í starvsfólkaviðurskiftum. Og sum starvsfólkaumboðsmaður (tilidsrepræsentant) í Den Danske Præsteforening, hevur Jákup Reinert Hansen PhD, framum onnur kunnleika til starvsfólkaleiðslu- og viðurskifti.

6. Førleiki og ikki fólkatekki er ein fyritreyt fyri at gerast biskuppur við skili. Hann, sum tveitti seljarnar út úr templinum bleiv ikki júst víðagitin fyri at smílast til høgru og vinstru og fyri at vilja gera øllum til vildar.

Eg fari at loyva mær at geva eitt boð uppá, hvør ið átti at havt skutin framman fyri allar aðrar í hesum valdystinum, og tað er Jákup Reinert Hansen, PhD. , skjótt Dr. Teol.